5 mill. BMW 500

Umlei› 27 ár eftir at fyrsti BMW 500 kom á markna›in, fór herfyri bilur nr. 5 mill. av samlibandinum á Dingolfing verksmi›juni, vi› 20 túsund starvsfólkum i› framlei›a 1200 bilar um dagin.

Kelda: BMW Magasin

Almera diesel



Seinasta leygardag var opi› hús hjá P/F Meinhardt Arge, her Nissan Almera vi› stórsta dieselmotori í sínum klassa var› s‡ndur fram.

Kelda: P/F Meinhardt Arge

25 ár vi› Polo

VW hátí›arheldur í døgum at 25 ár eru li›in sí›an fyrsti Polo kom á markna›in. Modelli› er skift tríggjar fer›ir, og framleiddir eru 6,5 milliónir bilar.

Kelda: Bilen Motor & Sport

S60 – sportsligur 5 persóna bilur frá Volvo

Í stødd er S60 ímillum S40 og S80

Í oktober kemur ein n‡ggjur Volvo S60 á markna›in, i› er ein rúmligur 5 persóna bilur, vi› sportsligari útsjónd.

V70 sum fyrimynd

At Volvo S60 er bygdur yvir sama plattform sum Volvo S80 og V70, vísir hvussu li›iligt eitt plattform koncept kann vera, vi› at tey ymisku bilmodellini kunnu byggjast yvir sama plattform. Í stødd er S60 mitt ímillum S40 og S80. Konstruktørarnir fingu til uppgávu at gera ein sportsligan bil, i› samstundis var ein rúmligur 5 persóna sedan. Fyrimyndin hevur veri› Volvo V70, men hesin er ein 13 cm stytri bilur.

Tryggur sum ein Volvo

Innan líkist hann nógv Volvo V70, so her er onki at skammast yvir. Av trygd innan kunnu vit nevna t.d. Dual-Stage airbag, har eitt ella tvey trin ver›a útloyst, alt eftir, hvussu ógvusligur samanstoyturin er. Inflatable Curtin, i› er ein gardina, sum verjir tey fer›andi framman og aftan vi› ein sí›usamanstoyt, eins og Side Impact Protection System (SIPS), sum eisini verjir vi› sí›usamanstoytir.

Einans 5 syl. motorar

Tann aktiva trygdin er á høgum stø›i, og bilurin klárar allar torførar umstø›ur uttan trupulleikar. S60 hevur eina brei›a sporvídd, passaligt vektb‡ti og ein vælvirkandi undirvogn, sum ger bilin sera lættan at koyra. S60 kann leverast vi› STC anti-spin, og eini DSTC (Dynamic Stabily and Traction Control) skipan, sum ger, at um bilurin glí›ur út til sí›una, ver›ur bremsukraftin tilpassa› solei›is, at førarin hevur gott tamarhald á bilinum. F‡ra bensinmotorar vi› 5 sylindarum ver›a at velja ímillum, harav tveir vi› turbo, og kraftin ver›ur úr 140 til 250 hk.

Umframt ta› vit her hava nevnt, fæst S60 vi› hópin av a›rari eykaútger›, sum kann leverast vi› bilinum eftir egnum ynski.

Magnus Gunnarsson

Trajet – ein væleydna›ur MPV frá Hyundai

Hyundai er komin á markna›in vi› einum heilt n‡ggjum MPV. Verkætlanin byrja›i fyri meira enn 30 mána›um sí›an og samla›u íløgurnar í menningina av hesum Hyundai Trajet hava veri› yvir 2 milliardir krónur. Navni› "Trajet" er franskt, og merkir naka› vi› fer›ing, farlei› og frítí›.

Designa›ur í Europa

Designararnir á Hyundai Design Studio í Mainz-Kastel í T‡sklandi fingu til uppgávu at gera ein MPV, sum skuldi liva upp til øll krøv, sum brúkarin í Europa setur. Tá teirra uppgáva var lokin, bleiv verkætlanin flutt til Hyundai í Korea, har framlei›slan var› sett í gongd. Úrsliti› er ein bilur, sum livir upp til ta› teir settu sær fyri.

7 persóna bilur

Innan er sera gott pláss til 7 persónar, vi› øllum hugsandi møguleikum at venda setrunum sum einum sjálvum lystir. Innrættingin er væl umhugsa›, og øll instrument eru løtt at yvirsko›a. Nokk av smáum plássum eru til at leggja lutir frá sær á, eins og stólabakini á forsetrunum hava flúgvarabor›.

Hyundai Trajet er ein 7 persóna MPU

Diesel næsta ár

Motorurin er ein 2.0 litur 4 syl. vi› 134 hk., vi› elektroniskari tendring og multipoint bensininnspræning, sum altí› gevur bestu kraft og er sera orkusparandi. Trajet fæst eisini vi› einum 2.7 litur V6 motori vi› 170 hk og automatgear sum standard. Fyrst í komandi ári kemur ein 2.0 TCI (Turbo Charged Intercooler) dieselmotorur vi› commonrail tøkni.

Eisini sum vøruvognur

Umframt nógva a›ra útger› hevur Trajet ABS bremsur vi› EDB, forlyktir vi› multifokus reflektor, radio vi› kasettuspælara, dupultan "depovered" airbag, sum minkar um vandan fyri ska›a á persónar i› sita framman í bilinum, vi› ta› at pútan ikki nertir vi› føraran og sí›umannin, fyrrenn trykki› er minka›. Hyundai Trajet er rúmligur, ljó›leysur og lættur at umgangast í allar mátar, og er longu nógv eftirspurdur sum vøruvognur.

Magnus Gunnarsson

Trajet er nógv eftirspurdur sum vøruvognur

Hyundai Trajet 2,0 GL

Motorurin	2.0 litur 4 syl 16V DOHC 136 hk
0-100 km/t	13,1 sek.
Bensinn‡tsla	13,8 km/l
Dekkstødd	215/65-15
Stødd og vekt	
Longd	469,5 cm
Breidd	184,0 cm
Hædd	171,0 cm
Eginvekt	1750 kg
Totalvekt	2400 kg
Prísur	Frá kr. 185.750 sum VAN
Søluumbo›	Nordbil v/ Martin Dam Jacobsen Oyggjarvegur Tlf 313707